Almanna- og heilsumálaráðið

# Skrivari til Almanna- og heilsumálaráðið

Eitt fulltíðarstarv sum skrivari hjá deildarstjóra í Almanna- og heilsumálaráðnum er leyst at søkja. Talan er um fyribilsstarv fyri tíðarskeiðið, 1. januar til 30. juni 2006.

Tú kemur at arbeiða sum skrivari hjá deildarstjóranum, á Fyrisitingardeildini, men harumframt eisini hjá starvsfólkunum á deildini; somuleiðis kann roknast við øðrum uppgávum í Ráðnum sum t.d.:

Vanligt skrivstovuarbeiði/málsfyrireiking.
At skipa fyri fundum.
Vera skrivari hjá nevndum/arbeiðsbólkum.

**Vit hugsa okkum at tú hevur:**
Skrivstovuútbúgving og hollar royndir.
Kunnleika til almenna fyrisiting.
Kunnleika til mál.
Hollan kunnleika til skrivligt føroyskt.
Kunnleika til EDV á høgum brúkarastøði.
Góð samstarvs- og samskipanarevni.
Duga at arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit bjóða:**
Eitt fjølbroytt og spennandi starv, sum tú sjálv/ur verður við til at skapa, til tíðir strævið, men samstundis sera áhugavert og mennandi við góðum skeið- og eftirútbúgvingarmøguleikum.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið og er flokkað í lønarflokki III.
Setanarøkið umfatar Almanna- og heilsumálaráðið og stovnar undir tí.
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Eyðun Mohr Hansen, deildarstjóran, tlf. 304050.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal sendast til:

**Almanna- og heilsumálaráðið**

Starvsfólkadeildina
Eirargarður 2
100 Tórshavn

**Umsóknarfreist: 12. desember 2005, kl. 12.00**





# Brót upp úr nýggjum

## Trý spennandi fulltíðarstørv í Eysturoynni til nýggja skipan innan sernámsfrøði

Nýskapan og menning eru neyðug innan sernámsfrøðiliga økið. Tað hava Mentamálaráðið, Sernámsdepilin og kommunurnar í Eysturoynni ásannað og hava tí valt at seta á stovn eina nýggja skipan innan sernámsfrøði.

Søkt verður eftir 3 framfýsnum starvsfólkum til at manna eitt gott toymi saman við serlærarunum í einari 2-ára royndarverkætlan við einari sernámsfrøðiligari tænastueind í Eysturoynni, sum verður stovnsett 1. januar 2006. Tænastueindin virkar sum sjálvstøðug eind undir Sernámsdeplinum.

### Størvini

Tú gert tær hugsanir um, hvussu sernámsfrøðin kann mennast og samskipast. Tú skalt kunna arbeiða sjálvstøðugt og samstundis hava hug og hegni at arbeiða tvørfakligt og at samstarva við aðrar fakbólkar.

**1. Samskipari**
Tú hevur útbúgving sum lærari og hevur arbeiðsroyndir. Tað er ein fyrimunur, at tú hevur leiðsluroyndir og viðkomandi eftirútbúgving. Arbeiðsuppgávurnar vera m.a. at leiða og fordeila arbeiðið í tænastueindini og vera tann, sum er andlitið úteftir.

**2. Sálarfrøðingur**
Tú hevur útbúgving sum sálarfrøðingur. Tað er ein fyrimunur, at tú hevur arbeitt við børnum. Arbeiðsuppgávurnar vera m.a. at kanna børn í økinum og vera við til at samskipa tiltøk kring børn við serligum tørvi.

**3. Skrivstovufólk**
Tað er ein fyrimunur, at tú hevur skrivstovuútbúgving og arbeiðsroyndir. Arbeiðsøkið er m.a. vanligt skrivstovuhald, skráseting og skrivarauppgávur.

### Setanarviðurskifti

Størvini verða sett sum skjótast. Lønar- og setanarviðurskifti verða sambært galdandi sáttmála við avvarðandi fakfeløg. Um skipanin verður varandi, verður talan um fasta starvssetan. Samskiparin og sálarfrøðingurin verða sett í Sernámsdeplinum við fyribils tænastu í Eysturoy. Skrivstovufólkið verður sett í Runavíkar Kommunu vegna avvarðandi kommunur í Eysturoynni.

### Umsókn

Umsóknir við neyðugum prógvum og viðmælum skulu í seinasta lagi 19. des. 2005 sendast til:
Sernámsdepilin, Frælsið 32,
110 Tórshavn

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Hans Eli Dahl, stjóra í Sernámsdeplinum, tlf. 314522, t-postadr. hanseli@snd.fo, ella til Janus Jensen, undirvísingarleiðara í Mentamálaráðnum, tlf. 355050, t-post janus@mmr.fo

Sernámsfrøðiliga Tænastueindin fer at liggja í Runavík, men arbeiðsøkið fatar um Funnings, Fuglafjarðar, Leirvíkar, Gøtu, Sjóvar, Runavíkar og Nes kommunu.

**Sernámsfrøðiliga Tænastueindin**
fer at liggja í Runavík, men arbeiðsøkið fatar um Funnings, Fuglafjarðar, Leirvíkar, Gøtu, Sjóvar, Runavíkar og Nes kommunu.

Sernámsfrøðiliga Tænastueindin
- samskipar serundirvísing og ráðgeving millum skúlar, stovnar, myndugleikar og foreldur í økinum
- veitir kommunum ráðgeving í sernámsfrøðiligum spurningum
- skipar fyri skeiðum til starvsfólk og foreldur
- skipar heildartilboð til næmingin við serligum tørvi. Tænastueindin
- hevur samstarv við barnaverndarstovur, heilsusystrar og sosialar deildir

sansir.fo

www.alzheimer.fo

## Jólacafé



Leygardagin 3. december kl. 10.00-16.00 verður jólacafé á Dalavegi 4. Høvi verður m.a. at keypa kaffi, bollar, holukøkur og vaflur, eisini verða seldir ymiskir lutir, ið húsfólkini hava gjørt.

Sosialurin 341800

Alzheimerfelagið

## Jørð í Sørvági

Eitt óbygt jarðarstykki til víddar 1.623 m² verður hervið lýst til sølu.

Stykkið hevur heitið matr. nr. 75 a, og liggur uppí í Húsadali í Sørvági.

Sambært byggisamtyktini er minni parturin av jarðarstykkinum í frílendisøki, meðan restin er í landbúnaðarøki.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Advokatskrivstovuna, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, att.: Jens Andrias Vinther, adv. ft, e-mail jav@jura.fo ella Birnu Joensen, e-mail bij@jura.fo".

Sosialurin 341800

Advokatskrivstovan
Fr. Petersensgøta 9 · Postbox 6 · FO-110 Tórshavn
Tel (298) 311145 · Fax (298) 311525

# Til sølu

Vit hava hoyggj, græsperlur og rótaperlur á goymslu.

**P/F I. R. Lastvognar, tlf. 421123**

# Til sølu

Inventar til klædnahandil til sølu.

**P/F I. R. Lastvognar, tlf. 421123**